Góðan dagin øll somul!

Eg eri sera fegin um at standa her í dag, til móttøkuna fyri Steno Miðstøðini. Stóra takk fyri innbjóðingina!

Fyri meg er tað at standa her, í hesum leiklutinum, nakað heilt serligt. Tí fyri stuttum hevði eg ein heilt annan leiklut í mun til hesa verkætlanina. Eg havi á jøvnum føti við fleiri av  tykkum, luttikið í arbeiðsbólkum, og verið við í prosessuni nærum frá byrjan.

Ein rúgva av fólki, í einum ótali av arbeiðsbólkum, hava luttikið í arbeiðinum við Steno Miðstøðini. Arbeiðið hevur verið skipað í

arbeiðsbólkum, har fleiri tykkara hava luttikið í fleiri arbeiðsbólkum.

Tilsamans hava umleið 90 fólk luttikið í arbeiðinum at orða innihaldi í Steno Miðstøðini.

Uttan tykkara íkast vóru vit ikki komin higar. Tað er tykkum øllum fyri at takka, at vit nú eru her vit eru (til móttøku á Steno Miðstøðini).

Fyrstu tíðina fer Steno Miðstøðin at húsast her í Útistovu. Men eftir ætlan verður nýggi bygningurin, sum skal hýsa virkseminum hjá tykkum, klárur at taka í nýtslu fyrst í 2026.

Tað vil siga, í mun til arbeiðsbólkar, eru ikki allar súðir syfta enn.

Afturat tykkum 90, sum higartil hava arbeitt við Steno Miðstøðini, arbeiðir ein bólkur afturat við sjálvum bygninginum, sum framyvir skal hýsa Steno Miðstøðini. Tað verður eisini spennandi at fylgja tí gongdini.

Men í dag fegnast vit um, at vit kunnu standa her - at føroyska Steno Miðstøðin er sett á stovn og farið verður til verka. Ja, sá fyrr í vikuni, at fyrsta Stenoverkætlanin er sett í verk – hjartaliga til lukku við tí.

Eg eri glað fyri, at allir viðkomandi partar í heilsuverkinum hava samstarva um Steno Miðstøðina, t.v.s. kommunulæknaskipanin, Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd og Heilsumálaráðið. Harumframt hava onnur luttikið á fundum og givið sín íblástur. Eitt nú granskarar og Apoteksverkið.

”Einki um okkum, uttan okkum” - Persónar við diabetes hava eisini luttikið á fundum. Steno Miðstøðin snýr seg um at veita enn betri viðgerðartilboð til teirra. Eg vil eisini nýta hetta høvið at takka teimum fyri teirra íkast, sum eisini er endurspeglað í innihaldinum í Steno Miðstøðini.

At Steno Miðstøðin nú er sett á stovn í Føroyum, er eitt stórt framstig og fer at tryggja at viðgerð, tvørgeiraligt samstarv og gransking innan diabetes og endokrinologi í Føroyum, framhaldandi verða ment.

Tað er gleðiligt, at vit nú kunnu fara at veita fólki við diabetes enn betri viðgerðartilboð, enn vit gera nú.

Eg fegnist um, at Føroyar verður ein partur at Steno-felagsskapinum saman við seks øðrum miðstøðum – fimm miðstøðir í donsku regiónunum og ein miðstøð í Grønlandi.

Allar miðstøðirnar hava til endamáls at fyribyrgja diabetes og betra lívsgóðskuna og livialdurin hjá persónum við diabetes. Í Føroyum er hetta galdandi fyri persónar við øllum endokrinologiskum sjúkum. Tað verður áhugavert at fylgja góðskumenningini í viðgerðini í Føroyum.

Arbeiðshátturin at skipa Steno Miðstøðina hevur verið nýggjur fyri okkum. Eg veit at hetta hevur kravt sera nógv av starvsfólkunum. Men tað hevur verið spennandi, mennandi og til tíðir kanska eisini ørkymlandi.

Hesin arbeiðshátturin kann vera til íblástur fyri, hvussu vit fara at menna onnur viðgerðarøki í heilsuverkinum.

Ein nevnd umboðandi heilsuverkið og Novo Nordisk Grunnin er sett fyri Steno Miðstøðina. Við leistinum, sum Steno Miðstøðin er skipað eftir, er farið undir eina skipaða tilgongd við framhaldandi menning innan økið.

Samstarvsavtalan við Novo Nordisk Grunnin um Steno Miðstøðina fevnir um eitt tíðarskeið yvir 10 ár. Tíðarskeiðið er býtt í 4, 4 og 2 ár. Har ætlanirnar ella verkætlanirnar fyri Steno Miðstøðina verða eftirmettar og tillagaðar um tørvur er á tí.

Hetta haldi eg sjálv er ein sera góður leistur, tí menningin innan økið kann hava við sær, at tær ætlanir, sum nú eru lagdar fyri Steno Miðstøðina, ikki eru viðkomandi um fimm ella sjey ár.

Eftir hetta verður møguligt at gera nýggjar samstarvsavtalur, fjórða hvørt ár.

Við at vera ein partur av Steno-felagsskapinum, fáa tit sum starvast innan økið, ein størri samstarvspall, har tit kunna deila og fáa vitan úr. Og tað er í síðsta enda til fyrimuns fyri sjúklingar við diabetes og endokrinologiskum sjúkum.

Endamálið við øllum tí, sum vit gera í heilsuverkinum, eigur at vera, at sjúklingurin ella borgarin fær eina betri tænastu.

Við hesum fari eg at ynskja tykkum øllum blíðan byr við Steno Miðstøðini.

Takk fyri!